

*Øll árini hevur tað verið Klaus Meine, sum hevur verið frontmaður í bólkinum. Hann var sjálvur triði við til at stovna bólkin*
*mynd: Scanpix*

var ein samrenning av absolutt størstu nøvnunum innan rocktónleikin.

Og ógvuliga hóskandi, so vórðu hesar konsertferðir – og helst eisini íblásturin av teimum – fylgdar upp av Crazy World. Ein útgáva, sum við Winds Of Change eisini inniheldur eitt tað vakrasta rock-lagið í søguni.

## Uppreisn við Unbreakable

Bæði sum live- og studiobólkur hava Scorpions síðani givið fløgur út síðani. Ikki allar hava tær fingið eins góða móttøku, og tónleikastílurin hevur eisini verið nakað sveiggjandi. At byrja við nakað tyngri, men síðani yvir í bæði bleytan og meira techno-kendan rock. Eitt millumspælt við symfoniskari útseting fekk bólkurin eisini tíð til, men tá Metallica longu hevði gjørt tað sama, áðrenn Scorpions-fløgan kom á marknaðin, varð hetta av mongum mett sum eftirgerð. Eisini hóast søgan handan Scorpions-útgávuna staðfesti, at hugskotið stavaði heilt afturi frá 1995.

Fleiri mundu kanska halda, at bólkurin hevði sæð sínar bestu dagar, men við Unbreakable, sum varð útgivin í 2004, vendi bólkurin aftur til røtur sínar. Sonnu fjepparanir hava eisini tikið hesa fløguna til sín, og uttan himpr má sigast, at bólkurin her endurreisti støðu sína sum tann mætasti týski rockbólkurin í søguni. Ein bólkur, sum ikki bara hevur skapt sín egna stíl og samleika, men sum so snaniliga eisini hevur slóðað fyri øðrum bólkum innan harða rock-tónleikin, sum kanska serliga vann seg fram í 80'unum.

Ein bólkur, sum ikki bara hevur sent nakrar av best umtóku útgávunum í rock-søguni á marknaðin, men sum samstundis hevur verið ein framúr live-bólkur, sum við nøkrum megnar konsert-ferðum hevur vunnið sær ein risa-stóran fjepparaskara kring allan knøttin.

Framførslurnar eru í dag ikki so nógvar í tali. Samanlagt kann árliga talið teljast á tveimum hondum, men fyri føroyingar er tann spurningurin ikki so áhugaverdur í ár. Ein av hesum verður nevnliga á Vágsbøi tann 4. august, tá Summarfestivalurin sendir størsta navnið í fýra ára longu søgu síni á pallin.

*Keldur: www.billboard.com, www.scorps.com" www.scorps.com og popp-meistarin Eivind Niclassen*

# Diskografi

**LP/CD**

| | |
|---|---|
| Lonesome Crow | 1972 |
| Fly To The Rainbow | 1974 |
| In Trance | 1975 |
| Virgin Killer | 1976 |
| Taken By Force | 1977 |
| Lovedrive | 1979 |
| (Remastered | 1997) |
| Animal Magnetism | 1980 |
| (Remastered | 1997) |
| Blackout | 1982 |
| (Remastered | 1997) |
| Love At First Sting | 1984 |
| (Remastered | 1997) |
| Savage Amusement | 1988 |
| Crazy World | 1991 |
| Face The Heat | 1993 |
| Pure Instinct | 1996 |
| (Clean Cover | 1996) |
| Eye To Eye | 1999 |
| Moment Of Glory | 2000 |

**Live**

| | |
|---|---|
| Tokyo Tapes | 1978 |
| World Wide Live | 1985 |
| (Remastered | 1997) |
| Live Bites | 1995 |
| Acoustica | 2001 |

**Uppsamlingar**

| | |
|---|---|
| Acton | 1972 |
| Rock Galaxy | 1980 |
| Hot & Heavy | 1982 |
| Best of Scorpionss | 1984 |
| Best of Scorpions, Vol. 2 | 1984 |
| Gold Ballads | 1985 |
| Best Of Rockers 'N' Ballads | 1989 |
| Hot & Slow (The Best Of The Ballads) | 1991 |
| Deadly Sting: The Mercury Years | 1997 |
| Big City Nights | 1998 |
| Master Series | 1998 |
| Best Of Scorpions: Millenium Collection | 2001 |

**Hava eisini givið út**

20 Imports album
37 Singles
16 Promo Singles
11 sjónbond/DVD

**Hartil partur av hesum útgávum:**

Soccer Rocks The Globe; Roger Waters: Live in Berlin; Masters of Metal – It's Alive; Masters of Metal – Strikeforce, Vol. 2; Wrecking Havoc 1975-1982, Vol. 2; Freejack Soundtracks; 80's Greates Rock Hits, Vol. 9; Monsters Of Rock, Vol. 2 Metal Masters; Guitar Rock; Tales From The Crypt: Bordello Of Blood; Heavy Metal Hits of the 80s: Vol. 1; Feel Like Makin' Love; Stairway To Heaven/Highway To Hell; Guitar Heroes; Stars In Spanish; Hard Rock Essentials – 1980's; Best of 80's Metal Vol. 1: Bang Your Head; ; Best of 80's Metal Vol. 3: Bang Your Head